## Dýnu-Larsen í arbeiðsrættin

Jysk Sengetøjslager noktar at geva starvsfolkum sínum lønarhækkan í ár, og ta avgerðina hevur fakfelagið HK skotið inn fyri arbeiðsrættin í Danmark.

Starvsfólkini fingu í brævi frá leiðsluni at vita um avgerðina, og at orsøkin var fíggjarkreppan.

Men fakfelagið heldur, at hetta er sattmálabrot, tí sambært sáttmálanum hava starvsfólkini rætt til at samráðast um løn.

Yvirskotið hjá Jysk Sengetøjslager í fjør var 254 mió. krónur.



## Jóngerð sett fyribyrgingarráðgevi

Blái Krossur Føroya hevur sett 36 ára gomlu Jóngerð Nielsen, Vestmanna, í starv sum fyribyrgingarráðgeva. Jóngerð er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur starvsroyndir innan ymisk økið. M.a. Er hon ikki ókend við arbeiðsøkið hjá Bláa Krossi. Síðan hon var liðug sum sjúkrarøktarfrøðingur í 2001 hevur hon í tveimum umførum starvast sum avloysari á Blákrossheiminum. Harumframt hevur Jóngerð arbeitt á Deild 1 á Landssjúkrahúsinum sum deildarleiðari í 4 ár. Seinasta árið hevur hon verið í farloyvisstarvi sum leiðari fyri barnaverndartænastuna í Vágum/Norðstreymi.

Fyribyrgingarráðgevin stendur á odda fyri fyribyrgingararbeiðinum hjá Bláa Krossi. Fyribyrgingararbeiðið verður gjørt við undirvísing, kunning og upplýsing millum børn, ung og vaksin. Verkætlanin "Børn í vanda/tilvita foreldur" er ein partur av arbeiðinum.

Jóngerð Nielsen byrjar í starvinum 17. august.

# Landsstýrisfólk finnast í kvøld

**Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, staðfestir, at tað verður í kvøld ella tíðliga í morgin, at løgmaður fær at vita, hvønn javnaðarflokkurin vil hava til heilsumálaráðharra**




*Í kvøld avgerð Javnaðarflokkurin, hvør fær helvtina av Almanna- og heilsumálaríkinum*

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað hevur verið gitt dúgliga, hvør verður landsstýrisfólk við heilsumálum. Bæði Dimmalætting og Sosialurin gittu í gjár, at tað verður antin Aksel Johannesen ella Eyðgunn Samuelsen. Harumframt var Katrin Dahl Jakobsen nevnd sum eitt gott boð í Sosialinum.

Aksel Johannesen sigur í morgun, at hann ikki væntar, at tað verður hann sjálvur. Og Eyðgunn Samuelsen vil ikki siga nakað sum helst.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, vil ikki siga nakað í morgun.

- Tit gittu í gjár, og tað kunnu tit bara halda fram at gera, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann greiðir tó frá, at klokkan 16 í dag fer Javnaðarflokkurin á fund um málið, eftir at tey vóru komin rættiliga langt í gjár.

- Tað eru enn nøkur ting, ið skulu fáast upp á pláss, men tað verður seint í kvøld, ella tíðliga í morgin, at eg fari at boða løgmanni frá, hvønn flokkurin peikar á, staðfestir hann.

### Formaðurin sigur onki

Jóannes Eidesgaard er annars púra kúrrur í morgun.

Er nakað hald í gitingunum hjá bløðunum í gjár?

- Tit halda bara fram at gita.

Dimma hevði ein topp 10 lista yvir, sum hevði tey 10 við mest atkvøðum. Verður hesin nýttur?

- Tað sigi eg onki um.

Kanst tú siga, um tað verður ein í tingmanningini ella onkur annar?

- Nei.

Kanst tú so siga, hvat kyn tað verður?

- Nei. Tað kann eg heldur ikki, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Men tað skilst, at John Johannesen, sum Sosialurin skrivaði um ein outsidara til sessin, nú er meiri inni í hitanum.

Hetta vil tí siga, at tað ikki verður fyrr enn seint í kvøld ella tíðliga í morgin, at nýtt landsstýrisfólk verður valt, sum Kaj Leo Johannesen, løgmaður, síðan setir í starv. Viðkomandi, ið verður valdur sleppur í øllum førum í ein heitan sess at umsita nógvan pening.

Í oddagreinini í Sosialinum í dag verður eisini tosað um eina umskipan í flokkinum.

# Ikki larma úti

**Hetta vóru boðini, sum løgreglan gav kafeini Mica í miðbýnum í Havn, bæði fríggja- og leygardagin, tí ov nógvur larmur var av konsertum. – Eg skilji væl, at hetta órógvar grannarnar, men tað er bara øgiliga keðiligt, tí tað hevur riggað so væl, sigur Hans Michael Hansen, eigari**

LARMUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Mica í miðbýnum hevur nakrar ferðir skipað fyri konsertum á terassuni. Men nú er eftir øllum at døma næstan liðugt við hesum.

Ikki færri enn tvær ferðir skipaði kafein fyri konsertum á terassuni, og ikki færri enn tvær ferðir varð kafein meldað.

- Vit vórðu meldaði fyri larm. Fríggjakvøldið høvdu vit konsert, og brádliga stóð løgreglan har. Leygarkvøldið var støðan tann sama. Eg haldi hetta sjálvandi vera keðiligt. Men eg skilji bæði grannar og politistar væl. Sjálvandi skulu fólk sleppa at sova, og løgreglan ger bara sítt arbeiði. Men tað er keðiligt, tá tað nú gekk so væl, sigur eigarin av kafeini.

### Gevast við konsertum

Hans Michael Hansen greiðir frá, at tað ikki var nakað stríð, og at kafein bara fekk eina átalu og boð um at dempa, men hann staðfestir eisini, at hetta helst merkir, at tað er liðugt við konsertum í Mica.



*Kafein Mica varð tvær ferðir meldað um vikuskiftið, tí hon larmaði ov illa*

- Tá mann fær løgregluna á kroppin hvørja ferð, so nyttar onki at blíva við, so vit gevast bara at skipa fyri konsertum út. Vit sleppa tó at hava konsertir inni, men hølini eru so lítil, at tað ikki verður tað sama.